# Hví hevur Tórshavnar Kommuna tagt?

UNN HENTZE
valevnið Miðflokksins til kommunuvalið 2008



Visti tú, at tá tað kemur til at byggja leigu/eigu og lutaíbúðir, tørvar ikki kommununi at bíða eftir, at løgtingið skal viðtaka ein bústaðarpakka?

Eg undrist á, at Tórshavnar býráð hevur verið so tigandi hesum viðvíkjandi, tá nú í fleiri ár hevur verið tosað um bústaðarmangul og ov høgar bústaðarprísir í Tórshavn. Hví hevur Tórshavnar býráð tagt og latið okkum bíðað eftir einum bústaðarpakka í fleiri ár, tá einki er til hindurs fyri at hon tekur sakina í egnar hendur?

# Býráðsvalið í Runavíkar kommunu

MAGNUS RASMUSSEN
Valevni á lista A til Runavíkar býráð



**Skúlaøkið**

Sjálvur havi eg arbeitt í Runavíkar kommunuskúla í mong ár og havi tí fylgt við á økinum.

Allir skúlarnir í kommununi eru rímuliga væl fyri. Í nógv ár hevur verið tosað um út- og umbyggingar av Runavíkar skúla. Nógv uppskot hava sæð dagsins ljós, men endaliga avgerðina um at byggja nýtt í Runavík tók sitandi býráð. Vit fáa um stutta tíð ein nýmótans skúla við øllum hentleikum, samstundis, sum hann eisini vil verða ein mentanardepil.

Eitt komandi býráð kemur at leggja síðstu hond á hesa stóru verkætlan og spennandi verður at fáa alt at virka væl. Hvussu fæst bókasavnið, og hvussu fáast aulan og kantinan at virka so væl sum møguligt, til gleði og gagn fyri allar borgarar í kommununi.Tað verða spurningar, sum komandi býráð kemur at verða við til at avgera.

**Útjaðarin**

Eitt sum komandi býráð eigur at leggja orku í, er at fáa útjaðaran í kommununi at føla seg sum part av heildini. Her haldi eg, at gongda leiðin er við raðfestingum, føstum mannagongdum og kunning. Nývalda býráðið eigur beinanvegin at finna fram til, hvørji grundleggjandi viðurskifti møguliga ikki eru í lagi í útjaðaranum. Her hugsi eg um vatn, kloakk, gøtuljós o.s.fr. Síðani eigur býráðið at raðfesta og seta eina tíðarætlan, nær hetta ymiska ætlandi verður gjørt. Síðani er alneyðugt, at borgararnir á staðnum fáa kunning um hetta, so óneyðugar misskiljingar ikki stinga seg upp.

Eitt annað sum ger seg galdandi er, at flest allar tær almennu tænasturnar í kommununi liggja náttúrliga í Saltangará og Runavík. Eg kann nevna TAKS, Almannastovuna, Apotekið og Politistøðina, bara fyri at nevna onkrar.

Eitt komandi býráð átti at umrøtt spurningin, um ikki møguleiki var at skipa fyri busssambandi millum meginøki og útjaðaran í kommununi.

**Kunning til borgararnar**

Dentur eigur at leggjast á at kunna borgararnar í kommununi so væl sum gjørligt um, hvat hendir í kommununi. Kommunan hevur sína heimasíðu, har vit kunnu fáa ymiskt at vita, men eg haldi tó, at kommunan skuldi tikið enn eitt stig á kunningarøkinum.

Her vildi eg skotið upp, at um nýggjársleitið skuldi hvørt húski í kommununi fingið ársrokniskapin fyri farna árið, saman við einum kunningarskrivi. Í kunningarskrivinum skuldi staðið, hvat ið høvuðsheitum arbeitt hevur verið við, og eisini, hvat liggur fyri framman í tí nýggja árinum.

# Virðiligari umstøður til tey eldru

HALLA SAMUELSEN
býráðslimur, valevni hjá Javnaðarflokkinum



Tað kann ikki passa, at vit í 2008 ikki kunnu nøkta tørvin hjá okkara eldru borgarum. Nógv eldri og gomul fólk, eru sera illa fyri og fáa ikki ta hjálp tey eiga og hava rætt at fáa. Nærmasta familian má ofta taka um endan fyri at vera hjá sínum eldru. Veit um fólk, sum eru noydd til at biða sær orlov frá arbeiði, og onnur, sum fáa sjúkramelding fyri at vera hjá sínum eldru. Nógv verða niðurkoyrd, tí í nógvum førum er hetta eitt 24 tíma arbeiði. Slíkt gongur nógv útyvir lívskvalitetin hjá allari familiuni. Vit mugu og skulu tí hava virðiligari umstøður til okkara eldru.

Um dagarnar var ein nøgdsemiskanning løgd fram har sagt var, at tað økið, sum borgarin er minst nøgdur við, er júst eldraøkið. Tí er hetta mest átrokandi mál hjá býráðnum at fáa loyst beint nú. At skapa fleiri búpláss til tey eldru í kommununi.

Tað standa í løtuni skrásettir 373 umsøkjarar til búpláss í Tórshavnar Kommunu.

Nakað er gjørt á hesum øki, og hevur býráðið fingið fleiri búpláss til tey eldru. m.a. Vallalíð, Tjarnargarð og Oman Mattalág.

Eisini er skjøtul settur á at gera ellis-og røktarheim yviri við Strond. Tá 1. byggistig er liðugt kunnu tey fyrstu 24 búfólkini flyta inn. Tá alt ellis- og røktarheimið er liðugt, vera tað 24 eldraíbúðir, sum koma afturat. Har vera íbúðir bæði til støk og pør.

Trupulleikin hjá Tórshavnar Kommunu er, at landið í veruleikanum eigur ábyrgdina av øllum eldraøkinum. Tórshavnar Kommuna hevur spurt seg fyri hjá landsmyndugleikunum, um at gerast royndarkommuna innan eldraøki, men svarið hevur verið noktandi. Mín meining er, at Tórshavnar Kommuna skal fáa alla ábyrgdina av eldraøkinum, og at peningur sjálvandi skal fylgja við frá landinum. So eri eg vís í, at Tórshavnar Kommuna fær bíðilistan til búpláss langt niður, og at borgararnir í kommununi fáa tey tilboð og ta hjálp, sum teir hava uppiborið.

Fái eg tín stuðul til Býráðsvalið tann 11. november, ert tú við til at betra um umstøðurnar hjá teimum eldru. Eg skal so gera mítt til at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

X við lista C

# Brenniovnar eitra ung og børn

RÚNI DJURHUUS
valevni á lista C



Eftir at hava lisið ein grein av Erling Eidesgaard um royk frá brenniovnum, varð eg skelkaður.

Greinin snúði seg um, hvussu eitrandi roykurin frá brenniovnum er, serliga fyri børn og ung. Til dømis kann sigast, at ein brenniovnur er 500 til 800 ferðir so eitrandi, sum ein oljufýring. Avleiðingarnar eru m.a. astma, kyknubroytingar, millumoyrnabruni, roykjaralungu, krabbamein, viknað mótstøðuføru og defektir á nervaskipanina.

Sjálvandi haldi eg, eins og nógv onnur, at tað er hugnaligt at sita framman fyri einum logandi og hugnaligum eldi í ovninum, men gleðin kann gerast stokkut, nú tað er staðfest, at hetta er so eitrandi fyri okkara børn.

Í Kalifornia hevur senatorurin Arnold Schwarzenegger sett fleiri forboð móti brenniovnum við tí grundgeving at teir seta mannalív í váða. Í grannalondunum hevur eitt nú Hvidovre kommuna sett forboð á ávísum støðum og ymsar árstíðir, tí astmasjúklingar fingu oftari herindi, enn vanligt.

Eg haldi, at Tórshavnar Kommuna skal ganga undan at hava eitt sunt umhvørvi. Mítt uppskot er, at frá eitt nú 2010 skal bara vera loyvi at brúka brenniovnar í desember mánaði. Í longdini kundi verið talan um fullkomuligt forboð fyri brenniovnum í Tórshavnar Kommunu.

# Ferðsluruðuleiki á Sundsvegnum

STEINFINNUR MITTELSTEIN
- eri at finna á lista B



Íbúgvarnir kring Sundsvegin vita ikki, hvat hendir við innkomuvegnum til Havnar. Hettar ørkymlar íbúgvarnar, tí samgongan heldur upplýsingum aftur.

Eftir at seinasta samgonga varð skipað, hoyrdist graml um, at samgongan varð treytað av, at ávís vegaføring ikki skuldi leggjast har skilabest er. Um tað er orsøkin til, at ongin avgerð enn er tikin, um, hvar vegaføringin skal vera, kann bara gitast um. Landsverk og tað almenna er síðani komin inn í málið. Onki veruligt frættist um, hvat hendir við hesum vegnum, og íbúgvarnir gerast alt meira ørkymlaðir.

Best sum øll sita undrandi og bíða hvat hendir, nú hoyrist at avkomuvegur av hesum sama ringvegi skal ganga oman eftir Sundsvegnum. Hettar er í dag tveysporaður vegur, sum er gjørdur í 1980-árunum og liggur tætt framvið íbúðarhúsum. Her liggja 3 barnagarðar, stovnar og síðuvegir, ið eru knýttir at Sundsvegnum. Hesin vegurin skal framyvir gerast tann mest trafikkeraði vegurin í landinum, við 18000 bilum um samdøgrið. Her kunna ikki øll klók høvd vera tikin uppá ráð, men heldur verður gingið áhugamálum hjá ávísum borgarum á møti, so skilagóðar loysnir ikki verða framdar.

Íbúgvarnir kring hesa ørvitis ætlan hava krav uppá at vera hoyrd og fáa innlit í málið. Okkurt av eigarafeløgunum hava biðið um innlit í málið, men ongi tíðandi skjøl eru útflýggja. Niðurstøðan er hon at hettar tolir ikki dagsins ljós, og tí verður ongin kunning í málinum, hóast hettar kemur at raka allar íbúgvarnar, ið búgva omanfyri Vestara Ringveg. Tað kann ikki vera rætt, at sitandi býráðssamgonga sleppur smoygja eina fullkomuliga óforsvarliga ætlan omanyvir íbúgvarnar við Sundsvegin, Villingardalsvegi, á Ternuryggi, undir Brúnni og Millum Gilja v.fl., uttan at nakar fær innlit og sleppur at gera viðmerkingar.

Uttan at lýsa málið yvirhøvur, er ætlanin at Sundsvegurin skal verða tann mest trafikkeraði vegurin í landinum, við 18 túsund bilum um samdøgri. Hettar vísur kanning, sum samgongan hevur lati gjørt av ráðgevingarfyritøkuni Rambøll Nyvig. Eg kann upplýsa at býráðsmeirilutin hevur samtykt ætlanina og biðið um 500 túsund til at gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum, umframt at bjóða projekteringarbeiðið út. Hettar er rættuliga álvarsligt fyri íbúgvarnar, og má steðgast á, áðrenn tað er ov seint.

Góðu borgarar, samgongan ætlar at tit skula gerast grannar hjá hesi ørvitis ætlan, uttan tit verða eftirspurd. Vilja tit at tað framvegis skal vera gott at búgva her uppi, og trygt at koma til og frá, umframt at tað skal vera gott hjá børnum at ferðast til og úr skúla, so skal hettar vendast á borðinum nú, so allir borgarar fáa innlit í ætlaninar hjá sitandi samgongu.

Geva tit mær tykkara stuðul, so vil eg vera tykkara umboð í málinum.